**FAKTA**

Navn: Beinta Poulsen
Aldur: 30 ár
Bústaður: Amager í Keypmannahavn
Útbúgving: Sniðgevi
Starv: Sjálvstøðug vinnurekandi við merkinum Soul Made, sum varð stovnað saman við eini vinkonu í 2003, men sum Beinta yvirtók og umskipaði í 2005
Heimasíða: www.soulmade.nu

gjørdu tað møguligt hjá mær at satsa 100% uppá Soul Made, greiðir Beinta frá.

## Framleiðir uttanlands

Beinta umskipaði handilin og legði mestsum alla framleiðslu í hendurnar á øðrum.

- Eg havi valt at framleiða øll pløggini uttanlands, bæði tí tað er bíligari og betri. Eftir at hava gjørt nakrar feilir, kom eg í samband við góðar framleiðarar, og nú verður alt seymað í Italia, India, Litavia og Kina. Onkur av framleiðarunum hjá mær ger eisini vørur fyri kend merki sum Malene Birger og Ivan Grunddahl, so tey eru von við høg góðskukrøv, greiðir Beinta frá.

Tað, sum hon nú í høvuðsheitum tekur sær av, er serliga pappírsarbeiði og fyrisiting. Harumframt teknar hon mynstrini, sum skulu seymast uttanlands. Royndarseymingar verða so sendar aftur og fram ímillum framleiðaran og Beintu, inntil hon er 100% nøgd við pløggini.

Hon lýsir sín stíl sum feminin-an, elegantan, uttan at vera ov pyntudukkusligan.

- Klæðini hjá mær skulu hava góðan kvinnuligan passform, so tað er altavgerandi, at tey sita væl. Tí verða tey ofta send aftur og fram fleiri ferðir, áðrenn eg eri nøgd, greiðir Beinta frá.

## Er eitt ár frammanfyri

Spurd hvaðani íblásturin kemur, svarar Beinta, at størsti íblásturin kemur úr Føroyum.

- Eg geri nógv bundin pløgg, og til tað nýti eg ofta føroysk bindingarmynstur. Men eg fái eisini íblástur úr stórbýnum, á gøtuni, ella tá eg eri úti og ferðist. Og eftirsum eg jú allatíðina arbeiði við kollektiónini, sum skal koma næsta ár, brúki eg eisini sonevndu "trendgranskararnar" nógv. Tað eru fólk, sum granska, hvørji næstu rákini fara at vera, greiðir Beinta frá.

Síðani 2005 hevur Beinta arbeitt við kollektiónum, sum hon selur í ymsum handlum kring heimin. Størstu sýnisgluggarnir hjá henni eru stóru mótamessurnar, sum eru tvær ferðir um árið. Messan fyri vár/summar er longu í august árið fyri, men tíðarfreistin fyri at melda seg til ta messuna og senda katalog við nýggjastu summarframleiðslunum er longu í januar. So hóast vit nú skriva oktober, og flestu okkara hugsa um vetrarklæðir, arbeiðir Beinta av øllum alvi við at framleiða vár-og summarkollektiónina, og samstundis við at sniðgeva heyst/vetur kollektiónina til komandi ár.

- Hetta er eitt ógvuliga tíðarávirkað starv. Tvær ferðir um árið havi eg ótrúliga nógv at gera, meðan tað so er eitt sindur minni stressandi restina av tíðini. Men tá fái eg so gjørt alt tað, sum eg annars ikki nái, greiðir Beinta frá.

Hon skoytir uppí, at hon til komandi vetur ætlar sær at fara undir eina jólakollektión eisini, og tað merkir enn fleiri tíðarfreistir og enn meiri arbeiði.

## Vil røkka longur

Tá eg spyrji Beintu, um hon er nøgd, nú hon er komin so langt innan mótavinnuna, sum sigst vera ein ógvuliga hørð vinna, svarar Beinta ikki beinanvegin.

- Eg haldi, at hetta er eitt stig á leiðini. Eg eri ótrúliga glað fyri, at tað hevur gingið mær so væl higartil, tí tað eru jú bert knøpp tvey ár, síðani eg byrjaði fyri meg sjálva. Men eg eri framvegis ikki heilt nøgd. Eg vil, at Soul Made skal vera eitt betri kent merki um allan heim, og at tað skal geva størri avkast. Eg eri framvegis á einum byrjunarstigi í so máta, tí peningurin, sum eg vinni, má nýtast til at lata fleiri dyr upp, og eg verði enn noydd at ofra mína løn viðhvørt, greiðir Beinta frá.

- Hóast eg eri útbúgvin sniðgevi, og eg arbeiði við mínum egna merki, so er tað lítil og eingin seyming í mínum arbeiðsdegi. Ístaðin snýr tað seg í stóran mun um marknaðarføring, forrætning og handilsstrategi, og tað haldi eg vera ótrúliga spennandi, sigur Beinta.

Hon heldur fram og sigur, at hóast hon nærum einki seymar sjálv, so er hon ómetaliga glað um, at hon hevur so góðan førleika í seyming.

- Tá fyrstu royndarseymingarnar verða sendar heim til mín, gangi eg gjølla ígjøgnum øll pløggini, og eg kann siga júst, hvar innsnitt skulu gerast, ella hvussu eg kann fáa plaggið at sita betri. Eg havi onkuntíð havt praktikantar, sum hava gingið í meiri komersiellum skúlum. Fleiri teirra hava ikki havt góðan kunnleika í seyming, og hava tí ikki dugað so væl at gjørt rættingar í royndarseymingunum, staðfestir Beinta.

Men hóast hon ikki seymar sjálv, hevur hon tó eina arbeiðsviku, sum er umleið 60 tímar, og hóast hon longu hevur trý fólk í starvi, sigur hon, at hon saktans kundi havt fleiri.

-Vit hava so nógv at gera, at eg vænti, at innan eitt ár havi eg sett tvey fólk afturat. Dreymurin er, at Soul Made er so mikið sterkt um 5 ár, at eg kann flyta heimaftur til Føroya og arbeiða haðani. Men til ta tíð má eg vera her í Keypmannahavn og ansa væl eftir teimum netverkum, eg havi, meðan eg alsamt royni at arbeiða meg enn longur upp, sigur Beinta Poulsen at enda.



Tekstur: Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo
Myndir: Sunva Eysturoy Lassen

**Tú hevur møguliga sæð Soul Made klæðir hjá Beintu Poulsen uttan at varnast tað, tí:**

- **Danski verturin á MTVnews, Pernille, var ofta í klæðum frá Soul Made, tá hon var á skíggjanum.**
- **Kenda danska pop sangarinnan Saseline hevur eisini nýtt klæðir frá Soul Made, tá hon hevur verið á skíggjanum við hennara sending um hús og bústaðir.**
- **Høvuðsleikarin í vælumtóktu donsku røðini um løgreglukvinnuna Onnu Pihl, sum vit hava sæð í Svf, hevur eisini verið í klæðum frá Beintu.**
- **Røðin "Klovn", sum Svf júst er farið at senda, hevur tvær ferðir nýtt klæðir frá Soul Made.**
- **Nýggja røðin, sum skjótt verður send á Tv3, nevnd "Maj og Charlie", hevur eisini gjørt eina avtalu við Beintu um at læna klæðir frá Soul Made.**
- **Seinni í ár verður danski filmurin "Det som ingen ved" útgivin, og har hava fólkini handan búnarnar eisini verið og hugt at kollektiónini hjá Beintu og lænt onkur pløgg til høvuðsleikaran Marie Bonnevie.**
- **Støðugt eru klæðini hjá Beintu at síggja í donskum bløðum, og bara í oktober hevur Soul Made verið at sæð í Femina, In magazine og Gravid.**